# Miðvís roynd at avtofta Klaksvíkina

**Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, er alt annað enn fegin um ætlanina um at flyta HF skeiðið í býnum yvir á Kambsdal. - Hetta er bara enn eitt dømi um miðvísu royndina hjá landsstýrinum at avtofta Klaksvíkina, sigur borgarstjórin**

KLAKSVÍKAR HF SKEIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Ein skandala, er fyrsta viðmerkingin hjá borgarstjóranum í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, til møguligu ætlanina hjá mentamálaráðharranum um at flyta Klaksvíkar HF skeið yvir á Kambsdal.

Steinbjørn skilur heldur ikki grundgevingina hjá mentamálaráðharranum, at flytingin av Klaksvíkar HF skeiði yvir á Kambsdal er ein uppløgd loysn, tí har longu er eitt hóskandi skúlaumhvørvi frammanundan.



*- Ætlaða flytingin av Klaksvíkar HF skeiði er ikki ein rationalisering, men enn ein niðurprioritering hjá sitandi landsstýri av Klaksvíkini, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík*

### Niðurprioritering

Steinbjørn vísir á, at í í Klaksvík er longu eitt gott og væl virkandi skúlaumhvørvi við Tekniska Skúla. Hví ikki flyta HF skeiðið niðan har, um talan veruliga er um rationaliseringar?, spyr hann.

- Sum enn eina óskiljandi grundgeving førir mentamálaráðharrin fram, at í framtíðini fer tað at taka klaksvíkingum 10 minuttir at koma yvir í Kambsdal. Hví ikki vísa á, at tað eisini fer at taka eysturoyingum 10 minuttir at koma til Klaksvíkar? Í prinsippinum er tað onki, sum forðar fyri, at flyta HF skeiðið á Kambsdali yvir til Klaksvíkar, sigur Steinbjørn og minnir á, at eitt HF skeið ikki er tað sama sum ein studentaskúli, og at tað tí heldur ikki kann brúkast sum grundgeving fyri at savna hesar báðar stovnarnar á Kambsdali.

Steinbjørn minnir á, at Klaksvíkar HF skeið longu er ein sera væl etableraður skúli við bæði munandi longri royndum og størri umsøkjaratali, enn HF skeiðið í Eysturoy. Tí dugir hann ikki at síggja annað enn, at hetta er ein spurningur um niðurprioritering hjá mentamálaráðharranum av HF skeiðnum í Klaksvík heldur enn upplagda rationalisering, sum ført verður fram.

### Steinur oman á byrðu

- Tað kann snøgt sagt ikki bera til, at tað hvørja ferð er Klaksvíkin, sum skal svíða fyri sokallaðu rationaliseringunum hjá landsstýrinum, tá vit vita, at aðrir møguleikar eru til staðar. Dømi við HF skeiðnum er bara sama søgan umaftur. Vit sóðu tað við flytingini av Toll og Skattstovuni herfyri, og fleiri líknandi ætlanir eru í umbúna, sigur Steinbjørn, sum ikki skilur, hví norðoya tingmennirnir ikki rakna við og tala at. Sjálvur heldur hann, at hansara royndir at forða fyri avtoftingini av Klaksvíkini byrja at líkjast einum einmansstríði. Beint áðrenn Toll og Skattstovan varð flutt, sendi borgarstjórin øllum norðoyatingmonnunum eitt bræv sum eina seinastu roynd at heita á teir um at gera sítt til at forða ætlanini. Men hann fekk onki svar frá nøkrum av teimum.

- Tingmenninir áttu at duga at sæð, at hvørja ferð hetta hendir, kennist tað sum steinur oman á byrðu hjá borgararum í Klaksvík, har tað ikki gongur ov væl í høvuðsvinnuni frammanundan. Hetta snýr seg jú ikki bara um, hvørt ein stovur skal liggja her ella har. Hetta snýr seg um trivnaðin hjá teimum menniskjunum, sum búleikast her til dagligt og í síðsta enda um teir framtíðarmøguleikar, tey megna at skapa. Sum gongdin er nú, er tað syndarlgt at síggja, hvussu hesir møguleikar miðvíst verða skerdir, sigur ein sera harmur borgarstjóri.

## Klaksvíkar Sløkkilið nýggjan leiðara



*39 ára gamli Finn Hansen úr Klaksvík varð á býráðsfundi hóskvøldið settur sum nýggjur leiðari fyri Klaksvíkar sløkkilið*

Á býráðsfundi í Klaksvík hóskvøldið var nýggjur sløkkliðsleiðari settur. Nýggi leiðarin hjá Klaksvíkar Sløkkliði er 39 ára gamli Finn Hansen, sum seinastu fýra árini eisini hevur verið sløkkliðsmaður. Finn er útbúgvin maskinsmiður og hevur seinastu 6 árini starvast á Norðoya Blikksmiðju. Hetta starvið verður hann nú noyddur at siga frá sær, við tað at starvið sum sløkkiliðsleiðari nú verður skipað sum fulltíðarstarv.

Væntandi fara fleiri broytingar at hendan innan tilbúgvingina í Klaksvík sum heild í nærmastu framtíð, og væntar Finn, at hetta fer at merkja fyrstu tíðina í nýggja starvinum.

- Í fyrsta umfari fari eg at seta meg væl og virðiliga inn í nýggju skipanina og tær broytingar, sum annars eru í umbúna. Eg eri sera spentur uppá nýggja starvið og taki tað avgjørt sum eina spennandi avbjóðing, sigur nýggi sløkkliðsleiðarin, Finn Hansen.

Jákup Mikkelsen:

# Ongin flyting uttan annan skúla í staðin

**- Tað kemur ikki uppá tal at flyta Klaksvíkar HF skeið úr býnum uttan at seta annan útbúgvingarstovn í staðin, sigur Jákup Mikkelsen, løgtingslimur fyri Norðoyggjar**

KLAKSVÍKAR HF SKEIÐ
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Jákup Mikkelsen, tinglimur fyri fólkaflokkin, er ikki ósamdur við avgerðini hjá mentamálaráðnum um at savna tey bæði HF skeiðini í Klaksvík og Eysturoynni á einum stað. Jákup minnir á, at enn er ongin endalig avgerð tikin um, hvat skal henda við HF skeiðnum í Klaksvík. Men hann fer ikki at góðtaka, at skúlin verður fluttur úr býnum, uttan so, at onkur ætlan fyriliggur um at seta eina aðra útbúgving í staðin.



*Jákup Mikklesen, tinglimur, minnir á, at enn er ongin endalig avgerð tikin um, hvat skal henda við Klaksvíkar HF skeiði, og at enn liggja fleir møguleikar í kortunum*

### Byrjaði í Klaksvík

- Vit skulu minnast til, at HF skeiðið á Kambsdali byrjaði í Gøtugjógv sum ein deild av Klaksvíkar HF skeiði, sum longu tá hevði fleiri ár á baki. Tí tykist tað heldur øvut, um tað nú verður Klaksvíkar HF skeið, sum skal flytast yvir á Kambsdal og gerast ein deild av skúlanum har, sigur Jákup Mikkelsen.

Jákup vísir á, at so leingi ongin endalig avgerð er tikin, liggja fleiri møguleikar í kortunum. Politikarar eru í ferð við at endurskoða alla miðnámsskipanina sum heild, og lítil ivi er um, at fleiri broytingar fara at henda.

- Í tí sambandinum fari eg í øllum førum at gera mítt til fyri at tryggja, at Klaksvíkin ikki verður við sviðið soð á útbúgvingarøkinum, tá endaliga avgerðirnar fella, sigur Jákup Mikkelsen.